# Áhugavert sjónarmið

**Landsstýrismaðurin í kommunumálum, Jógvan við Keldu, heldur, at tað eru bæði fyrimunir og vansar við at velja borgarstjórar á beinleiðis vali**

BÝRÁÐSVAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Tað er einki nýtt í ætlanini hjá Heðini Mortensen. Tað er eitt afturvendandi kjak um vit eiga at gera valið av borgarstjóra til eitt beinleiðis val. Eg haldi tankin er ógvuliga áhugaverdur, og eg eri ikki ósamdur við hansara sjónarmiðum.

Landsstýrismaðurin í kommunumálum, Jógvan við Keldu, vísir ikki hugskotinum hjá varaborgarstjóranum í Havn, Heðini Mortensen, at velja borgarstjórar beinleiðis í framtíðini frá sær.

Bæði og Landsstýrismaðurin sær bæði fyrimunir og vansar við at velja borgarstjórar á beinleiðis vali.

– Eg eri ikki ósamdur í, at tað ofta er tilvildin, sum avgerð, hvør verður borgarstjórar. Kortini er tað ikki meir tilvildarligt, at ein borgarstjóri altíð má hava ein meirluta aftanfyri seg. Tað kann kortini tykjast løgið, at ein tann persónur, ið fær fægst atkvøður kann enda sum borgarstjóri bara tí ein politisk telving skal ganga upp. Eg seti tó eisini spurning við um eitt beinleiðis val hevði gjørt valið meir rættvíst enn við galdandi skipan, sigur Jógvan við Keldu

Landsstýrismaðurin sigur, at eftir ætlan verður vallógin umrødd í hesi setuni, og spurningurin um borgarstjórar skulu veljast beinleiðis í framtíðini verður eisini viðgjørdur.

# Galdandi skipan riggar væl

**Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Jan Christiansen, heldur, at galdandi kommunuvallóg riggar væl. – Hon er so demokratisk sum gjørligt. Fyrst verður tú vigaður av fólkinum og síðani av hinum býráðslimunum, áðrenn tú kanst kalla teg borgarstjóra, sigur Jan Christiansen**

BÝRÁÐSVAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*– Ímynda tær, at flokkurin hjá valda borgarstjóranum endar í minniluta, so er skjótt, at klandur og kegl fara at eyðkenna býráðsarbeiðið, og tá er lítið vunnið, heldur Jan Christiansen.*
*Mynd: Savnsmynd*

– Eftir býráðsval er altíð kríggj um at koma í samgongu og at ogna sær borgarstjórasessin. Søgan sigur okkum, at tað er rein tilvild, hvør endar við borgarstjórasessinum. Verður borgarastjórasessurin gjørdur til eitt beinleiðis val, fær fólkið tann persón, tey ynskja í borgarstjórasessin, og tað má verða betur enn at tilvildin ræður.

Í Sosialinum mikudagin mælti býráðslimurin í Havn, Heðin Mortensen, til at gera valið av borgarstjóra til eitt beinleiðis val. Hann helt, at tað í ov stóran er politiska telvingin og ikki fólksins vilji, ið ger av, hvør endar sum borgarstjóri í teimum ymisku kommununum.

Á seinasta kommunuvali í Havn valdi meirilutin í Tórshavnar býráð at peika á Jan Christiansen sum borgarstjóra, hóast hesin endaði á triðja plássi á Fólkaflokslistanum í Havn. Bæði Jákup Suni Joensen og Bjarti Mohr fingu fleiri atkvøðu enn sitandi borgarstjóri.

Vit hava spurt borgarstjóran í Havn seinastu fýra árini, hvat hann heldur um hugskotið hjá Heðini Mortensen.

## Tryggari

Jan Christiansen heldur, at galdandi skipan riggar væl, og hon er eisini tryggari enn ætlanin hjá Heðin Mortensen.

– Galdandi skipan er so demokratisk sum gjørligt. Fyrst verður tú vigaður av fólkinum og síðani av hinum býráðslimunum, áðrenn tú kanst kalla teg borgmeistara, sigur Jan Christiansen

Hann leggur afturat, at tað er eisini tryggleiki hjá hinum býráðslimunum at at hava ávirkan á, hvør skal stýra kommununi.

– Gerst valið av borgarstjóra til eitt beinleiðis val, krevst av valevnunum, at tey hava gott fólkatekki og møguliga nógvar pengar at profilera seg við, meðan evnini at samstarva enda í aðru røð. Ímynda tær, at flokkurin hjá valda borgarstjóranum endar í minniluta, so er skjótt, at klandur og kegl fara at eyðkenna býráðsarbeiðið, og tá er lítið vunnið, heldur Jan Christiansen.

# Dahlgaard er ikki dagførdur

**Formaðurin í Føroyanevndini, Pia Larsen, væntar ikki, at Dansk Folkeparti fer at nema við skerjingina av heildarveitingini í samband við fíggjarlógarsamráðingarnar við stjórnina**

HEILDARVEITINGIN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*– Eg beri ótta fyri, at Per Dahlgaard ikki er dagførdur. Hann hevur eftir øllum at døma ikki fingið við, at søgan hjá TV2 var bygd á ósannandi, og tískil vórðu útsagnirnar hjá Dansk Folkeparti eisini bygdar á skeivar fortreytir, heldur Pia Larsen, formaður í Føroyanevndini*

Formaðurin í Føroyanevndini, Pia Larsen, sum umboðar stjórnarflokkin Ventre í Fólkatinginum, væntar ikki, at Dansk Folkeparti fer at gera álvara av sínum ætlaninum um at krevja eina skerjing av heildarveitingini í samband við samráðingarnar um fíggjarlógina 2005.

– Handan søgan fekk bert bein at ganga á, tí TV2 hevði eina sending fulla við villeiðandi og ósonnum tíðindum. TV2 hevur rættað mistakið, og tí er søgan eftir mínum tykki deyð. Eg ivist stórliga í um Kristian Thulesen Dahl hevur somu áskoðan um heildarveitingina, eftir at TV2 rættaði mistakið, sigur Pia Larsen.

Hon tekur tí ikki útsagnirnar hjá Per Dahlgaard, limi í fíggjarnevndini fyri Dansk Folkeparti, fyri fult.

Per Dahlgaard segði við Sosialin týsdagin, at Dansk Folkeparti kundi als ikki útihýsa møguleikanum fyri, at flokkurin fór at krevja eina skerjing av heildarveitingini í samband fíggjarlógarsamráðingar við stjórnina.

– Eg beri ótta fyri, at Per Dahlgaard ikki er dagførdur. Hann hevur eftir øllum at døma ikki fingið við, at søgan hjá TV2 var bygd á ósannandi, og tískil vórðu útsagnirnar hjá Dansk Folkeparti eisini bygdar á skeivar fortreytir, heldur Pia Larsen.

## Samráðingarspurningur

Eins og føroysku fólkatingslimirnir á Christiansborg, Høgni Hoydal og Lisbeth L. Petersen, søgdu í Sosialinum týsdagin, leggur Pia Larsen dent á, at spurningurin um heildarveitingin fyrst og fremst er ein spurningum millum donsku stjórnina og føroyska landsstýrið.

– Vit hava jú eina avtalu fram til 2006 um at blokkurin er góðar 600 mió. krónur. Spurningurin um heildarveitingina kann tí ikki gerast til eitt innanhýsis danskt mál í samband við fíggjarlógarsamráðingarnar, men ein samráðingarspurningur millum stjórnina og landsstýrið, vísir Pia Larsen á.



# Árni Dam sagt upp á Skipafelagnum

**– Ein orsøk til uppsøgnina er avgerðin um at selja Skipafelagið til Eimskip. Men Skipafelagið hevur verið eitt sera gott arbeiðspláss, sigur hann**

UPPSØGN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Meiri enn nakar annar, hevur Àrni Dam verið ímyndin av Skipafelagnum. Hann heldur, at tað hevur verið heimsins besta arbeiðspláss, men samanleggingin við Eimskip hevur nú fingið hann at siga upp: Hini trý fólkini á deildini, sum avgreiðir tey útlendsku skipini, sum Skipafelagið umboðar, hava eisini sagt upp*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Árni Dam hevur nú sagt upp á Skipafelagnum.

Hann hevur arbeitt á Skipafelagnum í 44 ár og meiri enn nakar annar, hevur hann verið ímyndin av hesum aldargamla felagnum.

Men nú hevur so hann kortini sagt seg úr starvi og er farin til hús.

Tað sama gjørdi øll hini trý fólkini, sum arbeiða á deildini hjá Árna Dam.

Hetta er deildin, sum hevur við útlendsk skip at gera.

Hóast hann er farin til hús, er hann tøkur, skuldi okkurt serligt stungið seg upp.

Hann leggur dent á, at Skipafelagið hevur verið heimsins besta arbeiðspláss.

Hann er eisini fáorðaður um uppsøgnina. Men hann viðgongur kortini, at ein orsøk til uppsøgnina, er, at Skipafelagið nú er selt Eimskip.

Hóast Árni Dam situr í nevndini í Skipafelagnum, visti hann nevniliga als onki um ætlanina at Selja Skipafelagið til Eimskip.

– Eg visti ikki av nøkrum, fyrrenn avtalan var klár at skrivað undir, sigur hann.

Tað heldur hann er løgin framferð, tí hann sat í nevndini í Skipafelagnum.

Men hann sigur eisini, at hann er eisini hart ímóti, at Eimskip skuldi sleppa at yvirtaka Skipafelagið.

– Skipafelagið er eitt gamalt felag og eg haldi, at tað skuldi víst rygg og verðið verandi eitt felag fyri seg sjálvt, sigur hann.

– Annars eri eg komin upp í árini. Samstundis eru nógv ung fólk í felagnum, so tað var kanska bara ein spurningur um tíð, áðrenn eg bleiv uppsagdur, sigur hann.

Àrni Dam fylti 68 ár sunnudagin, so hann heldur, at sum so er onki løgið í, at hann fer úr starvi nú. Og tað hevði heldur ikki verið løgið um hann varð uppsagdur, so at onkur yngri slapp framat.

## Byrja møguliga sjálvir

Sum sagt hava øll hini trý fólkini á deildini, sum avgreiðir útlendsk skip, eisini sagt upp.

Tað hevur ljóðað, at tey fýra nú ætla at byrja fyri seg sjálvi og at stovna eitt felag at avgreiða tey útlendsku skipini, sum Skipafelagið fyrr hevur avgreitt.

Àrni Dam sigur, at ongin avgerð er tikin um tað, men at tey kanna málið.

Og tað eru útlit til, at stovna tey egið felag at avgreiða útlendsk skip, fara tey at fáa nóg mikið at gera, tí Skipafelagið hevur avgreitt eini 600 útlendsk skip um árið hesi seinastu árini.

Av teimum hava eini 400 skip verið russisk og hini hava verið úr ymsum londum.

Men hann vísir á, at føroyska samfelagið er við at missa nógvar inntøkur av fremmandum skipum, tí reglarnar eru so óliðiligar.

– Nógv skip koma til Føroya at lossa vøru, sum skal víðari til onnur lond.

– Allur fiskur, sum verður uppskipaður í Føroyum, skal um eina bip-støð.Tað er eitt krav frá ES.

Sjálvt triðjalandsfiskur, sum kemur upp á land í Føroyum og sum skal sendast víðari til onnur triðjalond, skal um eina bip-støð.

– Enntá grønlendsk skip, sum leggja fisk upp í Føroyum, skulu bippa vøruna inn, hóast vit eru í ríkisfelagsskapi.

– Hetta er alt ov tvørligt og óliðiligt og er við at forkoma okkum hendan inntøkumøguleikan, sigur Árni Dam.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá Skipafelagnum, áðrenn blaðið fór til prentingar

# Fara ein lættan gongutúr í Suðuroy

**Leygardag tann skipa Kunningarstovurnar í Suðuroy fyri gongutúri av Hestinum oman í Kasparsholu og oman í Akraberg**

GONGUTÚRUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Leygardagin skipar ferðavinnan í Suðuroy enn einaferð fyri gongutúri úti í teirri stórfingnu náttúruni.

Hesuferð er túrurin av Hestinum, oman í Kasparsholu og oman í Akraberg.

Túrurin byrjar við Hestin, gingið verður ikki eftiir varðagøtuni, men eftir fjallarøðini til hagapartin í Sumba sum eitur »Blæðing«.

Her er sermerkt lendi við gróti, ið minnir um eina malastrond. Her eru fleiri holur, eitt nú Kjøtholan og Kasparshola. Vit fara fyrst inn í Kjøtholuna har tað sigst at Kaspar goymdi kjøtið. Á ferðini víðari oman í Akraberg er gott og sermerkt útsýni til Føroya syðstu klettar Munkin og Flesjarnar, so vónandi verður klárt í veðrinum.

Túrurin er lættur at ganga, tí tað er undanbrekka næstan allan vegin. Men tey vænta kortini, at túrurin tekur einar fýra tímar.

Staðkend heimildarfólk eru við á túrinum og tey fara uttan iva at fortelja søgnina um brøðurnar Kaspar og Sjúrð, sum fjaldu seg í Kasparsholuni.

Bussur koyrir av kunningarstovuni á Tvøroyri klokkan 10.00 og av kunningarstovuni í Vági klokkan 10.30 niðan á Hestin.

Tá ið túrurin er liðugur, koyrir bussur úr Akrabergi aftur til Vágs og Tvøroyri.

## Tilmelding og prísur

Kostnaður fyri gongutúrin og busskoyring er 100 krónur fyri vaksin men fyri børn er tað ókeypis.

Bindandi tilmelding til túrin skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342/ 284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480/ 284480 í seinasta lagi fríggjadagin kl. 16.00.

Tað er altíð klókt at hava heit og góð klæði við, góðar skógvar ella styvlar og tað kann eisini vera hugnaligt at hava matpakka og ein drekkamunn við. Hevur tú kikara og eitt kort yvir økið har gingið verður við tær, gerst túrurin óiva meiri áhugaverdur.

Nú eru bara tveir gongutúrar eftiri í summar í Suðuroy.

Tann 11. september verður gingið úr Hvalba til Sandvíkar, og seinasti túrurin í ár er 18. september úr Øravík til Vágs.